VELJARAKANNING

Samgongan tríðingin av tingsessunum

Feskasta veljarakanningin gevur Sambandsflokkinum søguliga vánaliga undirtøku

Eirikur Lindenskov

Sambært nýggjastu veljarakanningini, so høvdu vit fingið nýggja leiðslu í Tinganesi. Kanningin, sum er ein lemjandi ósigur til serliga Sambandsflokkin, sum missir 9 prosent, og Fólkaflokkin, sum missir 4,7 prosent. Samgongan hevði havt 14 tingesessir aftan fyri seg, meðan andstøðan hevði havt 19.

Søguliga afturgongd

Størsti taparin sambært kanningini, sum Gallup gjørdi fyri ting.fo, er Sambandsflokkurin. Flokkurin hevði mist heili 9 prosentstig í mun til seinasta val. Tá fekk Sambandsflokkurin 24,7 prosent. Í kanningini fær hann bert 15,7 prosent. Hetta hevði givið Sambandsflokkinum fimm tingsessir í mun til níggju, sum flokkurin hevur nú. Tá skal sigast, at flokkurin fekk átta umboð vald á ting á valinum, men hevur níggju, síðani Gerhard Lognberg varð koyrdur úr Javnaðarflokkinum og fór upp í Sambandsflokkin.

Afturgongdin hjá Sambandsflokkinum er søguliga stór. Ongantíð hevur flokkurin mist so nógvar atkvøður frá einum vali til annað, sum hann hevði gjørt, um hendan kanningin var valúrslit. Og ongantíð hevur flokkurin fingið so laka undirtøku, sum hesaferð, 15,7 prosent.

Sambandsflokkurin hevur bara tvær ferðir fingið undir 20 prosent av atkvøðunum. Tað var á valinum í 1974, tá hann fekk 19,1 prosent og í 1998, tá hann fekk 18,1 prosent. Í 1974 hevði Sambandsflokkurin sitið í samgongu saman við Javnaðarflokkinum og Sjálvstýrisflokkinum við Alta Dam sum løgmanni. Í 1998 hevði Sambandsflokkurin havt leiðsluna í Tinganesi við Edmundi Joensen sum løgmanni.

Hin stóri taparin í veljarakanningini er Fólkaflokkurin, sum hevði mist 4,7 prosentstig. Sambært kanningini fær Fólkaflokkurin 17,7 prosent. Hetta hevði givið Fólkaflokkinu seks tingsessir í mun til teir átta, sum flokkurin fekk á valinu seinast – ella teir níggju, sum flokkurin hevur nú, síðani Janus Rein fór úr Framsókn upp í Fólkaflokkin.

Aftur størsti flokkur

Stóri vinnarin í kanningini er Javnaðarflokkurin, sum hevði fingið eina framgongd upp á 7,4 prosentstig – úr 17,7 upp í 25,1 prosent. Hetta hevði givið Javnaðarflokkinum átta tingsessir, sum er tveir afturat í mun til seinasta val, ella tríggjar afturat teimum fimm, sum flokkurin nú hevur, síðani Gerhard Lognberg varð koyrdur úr flokkinum.

Javnaðarflokkurin hevur áður verið størsti flokkurin á tingi og havt oman fyri 25 prosent av atkvøðunum. Tað var í 1958, at flokkurin á fyrsta sinni gjørdist størsti flokkur og skipaði samgongu. Flokkurin helt støðuna sum størsti flokkur næstu 20 árini. Í 1978 gjørdist Sambandsflokkurin við Paula Ellefsen á odda størsti flokkur.

Vandringsmatrisan vísir, hvussu veljarar flyta ímillum flokkarnar. Serliga at leggja til merkis er, at Javnaðarflokkurin fær serliga nógvar veljarar frá Sambandsflokkinum, meðan 73 veljarar eru teir somu. Hjá Tjóðveldisflokkinum sæst, at 96 veljarar eru teir somu, meðan Sambandsflokkurin og Fólkaflokkurin varðveita ávikavist 62 og 63 veljarar

Tjóðveldi vinnur innaftur

Hin stóri vinnarin í kanningini er Tjóðveldi, sum hevði havt eina framgongd upp á 4,7 prosentstig og farið úr 18,3 prosentum á seinasta løgtingsval til 23 prosent. Hetta hevði givið Tjóðveldinum tveir tingsessir afturat.

Tjóðveldi hevur bert tvær ferðir verið størsti flokkur á tingi. Fyrra ferðin var í 1998, seinna ferðin í 2008. Men flokkurin hevur ongantíð havt leiðsluna í Tinganesi, ongantíð havt løgmann. Tað er bara Tjóðveldi av teimum stóru flokkunum, sum ongantíð hevur havt løgmann.

Ein afturat til Miðflokkin

Miðflokkurin er einast samgonguflokkur, sum hevði havt framgongd. Á seinasta løgtingsvali fekk flokkurin 6,3 prosent, sum gav flokkinum tveir tingsessir. Hend-



Vandringsmatrisa

	FÓLKAFLOKKURIN	SAMBANDSFLOKKURIN	JAVNAÐARFLOKKURIN	SJÁLVSTÝRISFLOKKURIN	TJÓÐVELDI	MIÐFLOKKURIN	FRAMSÓKN	MINNIST IKKI	STEMMADI IKKI / BLANKT	VAR IKKI Á VALI	IKKI VALRÆTT
Fólkaflokkurin	63	5	2	0	0	0	0	1	0	2	0
Sambandsflokkurin	1	62	1	0	0	0	0	0	0	2	0
Javnaðarflokkurin	4	20	73	1	1	0	1	2	0	6	1
Sjálvstýrisflokkurin	1	2	0	8	0	0	0	0	1	0	0
Tjóðveldi	5	2	5	0	96	0	0	2	1	1	5
Miðflokkurin	2	0	0	0	1	11	1	1	0	1	1
Framsókn	4	2	1	0	1	0	8	1	1	0	0
Veit ikki	17	17	4	2	2	1	1	9	0	3	3
Vil ikki svara	0	0	0	0	0	0	1	1	0	0	1
Fer ikki a val	2	4	2	1	1	1	0	3	0	12	1
Blankt	2	0	0	0	1	0	1	0	4	0	0
Ikki valrætt											

Mánaðir síðan síðsta val: 30   *Nýggir veljarar: 0,8*

Kelda: Gallup Føroyar / ting.fo

Kelda: Gallup Føroyar / ting.fo

		FÓLKAFLOKKURIN	SAMBANDSFLOKKURIN	JAVNAÐARFLOKKURIN	SJÁLVSTÝRISFLOKKURIN	TJÓÐVELDISFLOKKURIN	MIÐFLOKKURIN	FRAMSÓKN	FÓLKAFLOKKURIN	SAMBANDSFLOKKURIN	JAVNAÐARFLOKKURIN	SJÁLVSTÝRISFLOKKURIN	TJÓÐVELDISFLOKKURIN	MIÐFLOKKURIN	FRAMSÓKN	**SAMGONGAN** TILS.	**ANDSTØÐAN** TIL S.
Løgtingsvalið okt 2011	*29-10-2011*	22,5	24,7	17,8	4,2	18,3	6,3	6,2	8	8	6	1	6	2	2	19	14
Gallup desember 2011	*30-11-2011*	19,2	24,9	20,2	2,7	18,9	5,9	8,4	7	8	7	0	6	2	3	17	16
Gallup februar 2012	*21-02-2012*	19,0	24,4	20,2	3,3	20,8	4,9	7,4	6	8	7	1	7	2	2	17	16
Gallup juli 2012	*03-07-2012*	15,7	22,2	23,1	2,9	22,1	7,2	6,8	5	8	8	0	8	2	2	15	18
Gallup november 2012	*09-11-2012*	19,6	23,5	20,8	2,7	21,8	5,8	5,9	7	8	7	0	7	2	2	17	16
Gallup februar 2013	*25-02-2013*	19,3	21,7	22,5	2,6	22,0	6,9	5,1	7	7	8	0	7	2	2	16	17
Gallup september 2013	*16-09-2013*	17,2	22,1	21,7	4,5	23,6	5,3	5,7	6	7	7	1	8	2	2	15	18
Gallup mai 2014		17,8	15,7	25,1	4,1	23,0	7,7	6,5	6	5	8	1	8	3	2	14	19
Undirøtka í mun til valið		*-4,7*	*-9,0*	*7,3*	*-0,1*	*4,7*	*1,4*	*0,3*									